# Amariel Norðoy í Leikalund

**Fríggjadagin 10. oktober kl 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Amariel Norðoy upp í Leikalund í Klaksvík**



Heiti á framsýningini er: Útróðrarbørn (lívsins sálmar). Tað, at vaksa upp í Klaksvík, millum bátar, skip og trolarar, fólk í øllum aldursbólkum, har fiskivinnan var grundarlagið, og man sum barn upplivdi, at tað var lívsgrundarlagið, bæði útróðurin og langfara fiskarí. Amariel sigur, at tá ið hann vaks upp, snúði stórur partur av tilveruni seg heima hjá teimum um deksbátin, "Norðan", og at báturin gjørdist tekin um samanhald. At tú so at siga gróði saman við bátin. Hetta roynir Amariel at lýsa í sínum málningum á ein dramatiskan og lýriskan hátt.

Framsýningin verður opin til 31. oktober, mánadag til fríggjadag kl. 13 til 17.30 og leygardag kl. 10 til 13.

## Andlát og jarðarferðir

**Sivert Eliasen í Fuglafirði** andaðist á Vesturstovu 5. oktober, 90 ára gamal. Kistan fer av Vesturstovu týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju hósdagin 9. oktober klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sivert kunnu lata Vesturstovu eina gávu. Konta í Føroya Banka

**Marin Elisabeth Graeatorex**, fødd Jacobsen, ættað úr Sandavági, búsitandi í Derby í Englandi, andaðist 3. oktober, 88 ára gomul.

**Leo Michelsen**, ættaður av Tvøroyri, andaðist sunnudagin 5. oktober í Keypmannahavn, 81 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Deyvakirkjuni í Keypmannahavn fríggjadagin 10. oktober klokkan 13.

**Elydia Haldansen** andaðist á Ellisheiminum Mørkini sunnudagin 94 ára gomul. Kistan fer av Mørkini í Vestmanna kirkju mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Elydiu kunnu lata Ellisheiminum Mørkini eina peningagávu konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara góði mammubeiggi

**Sivert Eliasen**
Fuglafjørður,

andaðist á Vesturstovu 5. oktober, 90 ára gamal. Kistan fer úr Vesturstovu týsdagin kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju hósdagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Bernhardina**

Tey, ið vilja minnast Sivert, kunnu lata Vesturstovu eina gávu. Konta í Føroya Banka.

Nýggj listabók:

# Inn í livandi listina




*Í nýggju listabókini „Livandi list" viðger listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen listina hjá 49 núlivandi føroyskum listafólkum á ein hátt, sum gevur nýggja fatan av førosykari nútíðarlist*

**Listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen hevur givið út listabókina "Livandi list", har hon fer í dypdina við listini hjá 49 núlivandi føroyskum listafólkum**

LIST

Í bókini gevur Inger Smærup Sørensen eitt umfatandi innlit í ta livandi listina í Føroyum, við íkasti til tankarnar um, hvønn veg myndlistin í dag fer. Eisini vísir hon á, hvaðani hendan listin er sprottin.

Samstundis er eisini talan um eina bók, sum hugleiðir um ymisk rák og gongdir í altjóða listasøguni og knýtir tey saman við føroysku listini á ein hátt. Soleiðis verða tey 49 listafólkini sett inn í listfrøðiligan karm, ið gevur nýggja fatan av nútíðarlistini

Við bókini „Livandi list" fáa vit eisini fyri fyrstu ferð eitt yvirlit yvir føroyska samtíðarlist.

Í bókini eru meiri enn 250 myndir. Umframt tey kendu listafólkini, so verða fleiri listafólk umrødd, sum enn liggja í útjaðaranum í føroyska listaheiminum. Felags fyri øll er tó, at tey hava sýnt fram í Føroyum seinastu árini.

Bókin verður útgivin í tveimum útgávum – einari føroyskari og eini danskari.

Í sambandi við at bókin "Livandi list" kemur út, verður móttøka í "Rit og Rák" í SMS fríggjadagin 10. oktober kl. 16.00.

Umframt rithøvundin, vera fleiri av listafólkunum til staðar.

**-ave-**

Dagurin
9. oktober. Dionysius, deyður umleið ár 258. Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmatre, ið merkir martýrfjallið. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd. Símun av skarði doyði hendan dagin í 1942.